# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hálkan var ikki orsøkin…

Vetursins fyrsti kavi kom um vikuskiftið – so passaliga væl hóskandi, nú jólatrø vórðu tendrað, og jólahald hildin ymsa staðni kring landi.

Hóast greiðar ávaringar, so er vetursins fyrsti kavi eins stórur hvøkkur hjá summum, sum lundi á jólanátt. Hetta hoyrdu vit løgregluna greiða frá í morgun, tá politirapportin var á breddanum í útvarpinum. Fólk minnast ikki til at skøða sær bilin, og tí er sama skilið á hvørjum ári, at alt ov nógv óhapp henda – har tað ikki er hálkan sum hevur skuldina, men beinleiðis kleyvarskapur, tí fólk fara út at koyra í vána líkindum, hóast bilurin ikki er skøddur, og tað tí í roynd og veru ikki ber til at koyra eftir umstøðunum.

Kjakið um píkar í mun til vetrardekk ella lamelldekk er frammi á hvørjum ári. Vit verða helst ikki samd um hendan spurning – sum kortini meira er ein umhvørvis- og heilsuspurningur, enn ein spurningur um pengar úr kommunukassum til nýtt asfalt.

Tað eru meira enn tríati ár síðani, at Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður, sum forrestin fyllir 90 ár mikudagin, kom við uppskotinum um at banna píkum. Hetta skapti mikla orrustu, og hann fekk eyknevnið Píka-Dánjal. Hann skeyt upp, at vit við lóg bannaðu píkum. Sama kjakið er frammi enn, men lítið eru vit komin víðari.

Tað er sjálvandi trygdin, sum skal í hásæti, tá vit tosa um ferðslu. Nógv átøk eru gjørt, men tað skerst ikki burt, at tað er hin einstaki bilførarin, sum hevur størstu ábrygdina fyri, at vit kunnu ferðast trygt í bilferðsluni. Spurningurin um píkar ella ikki píkar er sekunderur í hesum spurninginum. Fleiri ferðir er staðfest, at bilar við lamelldekkum klára seg eins væl. Í Føroyum hava vit eisini so fáar kavadagar, og tað elvir sjálvandi til, at vit hava nógvar bilar sum koyra við píkum á kava- og frostfríum asfalti, og tá er trygdin heldur ikki í hásæti.

Higani skulu vit bara minna á, at hálkan ongantíð í sær sjálvum er orsøkin til óhappið, men at viðkomandi ikki koyrdi eftir umstøðunum. Tað er bilførarin, sum er orsøkin, tí hann koyrdi bilin. Latið okkum leggja okkum tað í geyma – ferðslutrygdini at frama.

**Sosialurin**

## Eitt valdømi: til frama fyri øll

**DÁVID ISFELD**
Hósvík



Fólk eru farin at tosa negativt um Føroyar sum eitt valdømi - enn eitt feilfokus orsakað av fíggjarviðurskiftini (hitt er blokkstuðulin) - ja enntá politikarar, sum eiga at vita betur. Føroyar hevur verið eitt valdømi í tvey ár, og longu nú vilja nógv hava hesa skipan annuleraða. Hví tað? Eftir flestu neiligu útsagnunum at døma, er tað einfalt tí, at fólk ikki kenna rikna politikkin aftur í ynskilistanum hjá teimum fyri lokaløkið - tað síggi eg bert sum eitt pluss, tí hesir ynskilistar minna mest um órealistiskar jóla-ynskilistar hjá ovurforkelaðum børnum.

Um ætlanin er at fara aftur til gomlu valskipanina fyri at royna at garantera øllum ynskjunum hjá Føroya fólki, so mugu vit ómøguligt fara aftur til gomlu valskipanina, tí tað hava vit einfalt ikki ráð til.

Harafturat má eg siga, at ein kollveltandi valskipan má hava nakrar »barnasjúkur« tey fyrstu árini - alt annað hevði verið óvanligt og sera løgið. Henda skipan má sleppa at standa sína roynd í eini 3-4 valskeið. Nýggja valskipanin krevur jú eisini, at vit hugsa um Føroyar á ein nýggjan og nýskapandi hátt. Føroyingar hava fingið nýggj lívsvirðir, nýggj sjónarmið viðvíkjandi einum eydnu- og innihaldsríkum lívi o.s.fr. Vit kunnu ikki hugsa og handla eftir teimum fortreytum, livihættum og lívsáskoðanum, sum ráddi í Føroyum í 70'unum og 80'unum, tí tann yngri og støðugt vaksandi parturin av føroyingum hugsar og raðfestir ikki á sama hátt ella eftir somu kriterium, sum føroyingar í bestu árum í 70'unum og 80'unum. Teldu- og tøkniøldin er eisini komin til Føroya, tískil er tíðin komin til at fara frá at vera eitt u-land til at verða eitt i-land.

**Einføld realisma**

Eins og onnur lond mugu vit fyrihalda okkum til teir pengar vit hava, og ikki teir pengar vit ikki hava. Føroyar kunnu skipast og rekast bíligari, uttan at livistøðið í Føroyum lækkar, um vit góðtaka umstøðurnar, har vit liva - ein kann altíð flyta til ein annan stað, um persónlig/sosial ella onnur virði, raðfesting ella ynski broytast. Allar umstøður kunnu batna - eisini í miðstaðarøkinum - men lat okkum halda okkum til tað neyðuga fyrst, og samferðslumarglæti og ómaksloysi næst.

Trupulleikin er ikki, at vit eru farin til eitt valdømi, men at føroyskur politikkur framvegis er lokalpolitikkur. At vera tilvitandi um støðuna í tí økinum ein er frá, fyri soleiðis at vita hvørjar ábøtur og menningar ein kann arbeiða framímóti, er ikki tað sama sum, at lokaløkið skal hava alt, tað ynskir beinanvegin, uttan fyrilit fyri hini økini og fíggjarligu karmarnir hjá landinum.

Politikarir og fíggjarlóg minnir meg mest um børnini hjá mær, tá ið eg seti eina skál av bommi á borðið til tey - alt er uppi, áðrenn eg fái býtt tað ímillum tey. Eitt valdømi er eingin trupulleiki - tað er hjáveran av lokalpolitikki og fráveran av skynsamum fíggjarpolitikki harafturímóti.

## Tolsamir MAP arkitektar – ein viðmerking til sjónvarpssending

**JENIS AV RANA**
kommunulækni



Týsmorgunin í farnu viku ringdi fyrikomandi blaðmaður á Sosialinum til mín, hevði hoyrt um ráðstevnu, eg hevði verið á í Ukraina, hann hevði nakrar spurningar. Talan var um læknaliga ráðstevnu, har læknar og annað heilsustarvsfólk úr øllum heiminum høvdu sett hvør øðrum stevnu, millum hesi vóru vit tveir úr Føroyum.

Blaðmaðurin og undirrirtaði fingu eitt stutt prát, m. a. um eitt av endamálunum við ráðstevnuni, ið er at gjøgnumganga læknaliga prógvaðar grøðingar. Hetta verður gjørt við tí vón, at tað kann eggja øðrum at biðja fyri sjúkum. Tá hann eftir práti spurdi, um myndamaður kundi koma framvið at taka mynd, játtaði eg.

Greinin stóð at lesa í Sosialinum um kvøldið.

Í gjárkvøldið varð grein blaðmansins brúkt í sjónvarpssending. Vællærdir arkitektar o. o. vóru samlaði um hana og nýttu høvið at niðurgera undirrtaða, m. a. varð lítið hugalig diagnosa stillað.

Orsaka meg mínir góðu arkitektar, men vónandi skilja tit undran mína og ynski mítt um eina nærri frágreiðing.

P. s.
At Bergljót og vinkonur í somu sending leggja mær orð annara í munn, ger bert undran mína enn størri.

## Republic Service

**JOHAN PETERSEN**



Public Service. Óheftur tíðindaflutningur .

Brynhild Thomsen og Jógvan Mørkøre sum viðmerkjarar .
Eg meini tað!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.